# Fingu fløskugávu við postinum

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin og leygardagin:**
Fleyr til gul millum norðan og eystan, yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 13 stig.

*Juni var bæði turrur í lýggjur. Avfallið var bert 17mm ímóti 66mm, sum er miðal yvir 30 ár. Miðalhitin var 9,9°c ímóti 9.0°c yvir 30 ár.*

**Hans Andrias og Halldis T. Johansen fingu mikudagin ein pakka úr Noregi. Í pakkanum vóru nakrar myndir, eitt bræv og bomm. Alt fyri ein fløskupost tey sendu í februar**

FLØSKUPOSTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

22. februar avgjørdu 9 og 6 ára gomlu Halldis og Hans Andrias T. Johansen saman við foreldrum sínum at senda ein fløskupost. Mikudagin fingu tey bæði børnini svar úr Lofoten í Noregi, at fløskuposturin, ið varð sjósettur við Skansan í Havn, var funnin. Men tað var ikki líkt til, at posturin skuldi fara nakran veg.

- Tá babba blakaði hann á sjógv, fór fløskan inn í eina holu, so vit roknaðu ikki við, at hann fór at koma útaftur. Vit sóu ongantíð fløskuna aftur. Men eg trúði alla tíðina, at onkur fór at finna postin, sigur Halldis T. Johansen við einum stórum brosi.

**Bomm og ballónir**

Mikudagin kom svar úr Noregi. Tvær fýra og seks ára gamlar systrar høvdu funnið postin, tá tær høvdu vitjað ommu sína 5. mai í ár.

Men tað var ikki bara eitt bræv systkini í Havn fingu. Í pakkanum var nevniliga ymiskt. Umframt eitt bræv, har genturnar í Noregi greiða frá, hvørjar tær eru, og hvar posturin er funnin, so vóru eisini bomm, nakrar ballónir og myndir av gentunum og fløskupostinum.

Hans Andrias og Halldis fara eisini sjálvandi at svara gentunum, sum búgva við Leknes í Lofoten.

- Vit fara at senda teimum bræv. Men vit fara eisini at senda teimum bomm og so fara vit eisini at fortelja, at vit hava verið í bløðunum. Kanska gera vit eisini sum tær og skriva, at vit vóna at hoyra skjótt frá teimum, greiðir Halldis T. Johansen álvarsliga frá.

So áðrenn vit vita av, so verður ein pakki ávegis til Noregs, har nøkur bomm, onkur mynd og eitt hondskrivað bræv eru í.



*Lítið vistu Halldis og Hans Andrias, at tey fóru at fáa ein stóran pakka úr Noregi, tá tey sleptu fløskuposti við Skansan í Havn í februar*

*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ







**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1022 hPa. sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Eitt lágtrýst, 996 hPa. yvir Suður-Noreg fer spakuliga suðureftir.

**Komandi nátt:**
Hátrýstið vestan fyri Føroyar viknar nakað. Lágtrýstið yvir Norðsjónum fer spakuliga í landsynning.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/07 kl. $06^{00}$ – 07/07 $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 06/07 kl. $06^{00}$ – 07/07 $06^{00}$.
Avfallið higartil í juli: 2 mm




Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

7. juli — Fullmáni/
Mánin longst frá jørini
15. juli — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. juli | 09:01 | 21:19 | 08:01 | 20:19 | 08:16 | 20:34 | 11:01 | 23:19 | - | 12:01 | 07:16 | 19:34 |
| 10. juli | 09:38 | 21:56 | 08:38 | 20:56 | 08:53 | 21:11 | 11:38 | 23:56 | 00:19 | 12:38 | 07:53 | 20:11 |
| 11. juli | 10:15 | 22:33 | 09:15 | 21:33 | 09:30 | 21:48 | - | 12:15 | 00:56 | 13:15 | 08:30 | 20:48 |
| 12. juli | 10:51 | 23:09 | 09:51 | 22:09 | 10:06 | 22:24 | 00:33 | 12:51 | 01:33 | 13:51 | 09:06 | 21:24 |
| 13. juli | 11:27 | 23:46 | 10:27 | 22:46 | 10:42 | 23:01 | 01:09 | 13:27 | 02:12 | 14:31 | 09:42 | 22:01 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. juli | 06:16 | 18:34 | 09:16 | 21:34 | 10:16 | 22:34 | 08:46 | 21:04 | 10:01 | 22:19 |
| 10. juli | 06:53 | 19:11 | 09:53 | 22:11 | 10:53 | 23:11 | 09:23 | 21:41 | 10:38 | 22:56 |
| 11. juli | 07:30 | 19:48 | 10:30 | 22:48 | 11:30 | 23:48 | 10:00 | 22:18 | 11:15 | 23:33 |
| 12. juli | 08:06 | 20:24 | 11:06 | 23:24 | - | 12:06 | 10:36 | 22:54 | 11:51 | - |
| 13. juli | 08:42 | 21:01 | 11:42 | - | 00:24 | 12:42 | 11:12 | 23:31 | 00:09 | 12:27 |